Heilsumálaráðið

Dagfesting: 24.09.2020
Mál nr.:
Málsviðgjørt: GMM

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§ 6. Stuðul verður veittur til uppihald á einum av landsstýrismanninum góðkendum eftirbataheimi í upp til 4 vikur. Stuðulin er treytaður av, at lækni metir uppihald vera neyðugt aftan á viðgerð á sjúkrahúsi ella í serligum førum aftan á læknaviðgerð í heiminum. *Stk. 2*. Heilsutrygd kann, um lækni metir framhaldandi uppihald vera neyðugt, veita stuðul til uppihald í 2 vikur afturat.	§ 6. Yvirskriftin yvir § 6 verður strikað.
§ 10. Heilsutrygd rindar fyri hjálparráð, sum er liður í einari viðgerð, ella sum er til persónar, sum ikki hava vantandi tørv á hjálparráði.	§ 10. verður orðað soleiðis: Landsstýrismaðurin í heilsumálum setur eina hjálparráðsnevnd at taka avgerð sambært reglunum í § 10, stk. 4 og stk. 5.
§ 10, *stk. 2*. Ískoyti verður veitt til gjald fyri hjálparráð at nýta í sambandi við heilivág.	§ 10, *stk. 2* verður orðað soleiðis: Hjálparráðsnevndin er mannað við trimum føstum limum; einum umboði frá Heilsutrygd, einum umboði frá Apoteksverkinum og einum umboði frá Sjúkrahúsverkinum. Harumframt einum ella fleiri serkønum limum við læknafakligari

	útbúgving. Heilsutrygd veitir skrivara og rindar kostnaðin av hjálparráðsnevndini.
§ 10, *stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um hjálparráð sambært hesi grein.	§ 10, *stk. 3.* verður orðað soleiðis: Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um virksemi nevndarinnar, tá henda skal viðgera umsóknir um tilskot til hjálparráð.
Ongin galdandi orðing	§ 10, *stk. 4.* verður orðað soleiðis: Heilsutrygd veitir ískoyti til hjálparráð, sum í kunngerð eru lýst at vera tilskotsheimilað hjálparráð.
Ongin galdandi orðing	§ 10, *stk. 5.* verður orðað soleiðis: Heilsutrygd veitir ískoyti til hjálparráð, sum er liður í einari viðgerð, ella sum er til persónar, sum ikki hava varandi tørv á hjálparráði.
Ongin galdandi orðing	§ 10, *stk. 6.* verður orðað soleiðis: Ískoyti verður veitt til gjald fyri hjálparráð at nýta í sambandi við heilivág.
Ongin galdandi orðing	§ 10, *stk. 7.* verður orðað soleiðis: Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um hjálparráð sambært hesi grein; harundir møguligt egingjald ella depositum á hjálparráðum, hvussu stórt tilskot verður veitt til tað einstaka hjálparráði, og hvørji hjálparráð tilskot verður veitt til.
§ 18, *stk. 2.* Eru útreiðslurnar innan fyri eitt ár undir 500 kr., verður onki tilskot veitt.	§ 18, *stk. 2.* verður orðað soleiðis: Eru útreiðslurnar innan fyri eitt ár undir 1.500 kr., verður onki tilskot veitt.
§ 18, *stk. 3.* Eru útreiðslurnar innan fyri eitt ár yvir 500 kr., er tilskotið: 1) 40% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 500 kr. og upp til 1.000 kr., 2) 60% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 1.000 kr. og upp til 2.000 kr., 3) 75% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 2.000 kr. og upp til 5.300 kr. 4) 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 5.300 kr.	§ 18, *stk. 3.* verður orðað soleiðis: Eru útreiðslurnar innan fyri eitt ár yvir 1.500 kr., er tilskotið: 1) 35 % av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 1.500 kr. og upp til 3.000 kr., 2) 55 % av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 3.000 kr. og upp til 6.000 kr., 3) 100 % av tí partinum, sum fer upp um 6.000 kr.
§ 18, *stk. 4.* Børn og ung, yngri enn 18 ár, gjalda ikki egingjald.	§ 18, *stk. 4.* verður orðað soleiðis: Eru útreiðslurnar hjá fyritíðarpensjónistum og persónum, sum eru fyltir 67 ár yvir 1.500 kr, er tilskotið: 1) 35 % av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 1.500 kr og upp til 2.000 kr., 2) 100 % av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 2.000 kr.
§ 18, *stk. 6.* 1. januar á hvørjum ári verða upphæddirnar í stk. 2 og 3 prístalsviðgjørdar í kunngerð.	§ 18, *stk. 6.* verður orðað soleiðis:

	Um ein persónur fyllir 18 ár í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 2 og 3 fram til tíðarskeiðið endar.
Ongin galdandi orðing	§ 18, *stk. 7.* verður orðað soleiðis: Um ein persónur fyllir 67 ár ella gerst fyritíðarpensjónistur í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 4, 1) og 2) fram til tíðarskeiðið endar.
Ongin galdandi orðing	§ 18, *stk. 8.* verður orðað soleiðis: 1. januar á hvørjum ári verða upphæddirnar í stk. 2, 3 og 4 prístalsviðgjørdar í kunngerð.
§ 24. Øll, sum hava fylt 18 ár og sum eru fevnd av hesi lóg, gjalda 175 kr. um mánaðin, umframt 0,60 % av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd.	§ 24 verður orðað soleiðis: Øll, sum hava fylt 18 ár og sum eru fevnd av hesi lóg, gjalda 175 kr. um mánaðin, umframt 0,70 % av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd.
§ 29. Avgerðir tiknar av Heilsutrygd ella Landsapotekaranum sambært hesi lóg, kunnu kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið boð um avgerðina.	§ 29 verður orðað soleiðis: Avgerðir tiknar av Heilsutrygd, Landsapotekaranum ella Hjálparráðsnevndini sambært hesi lóg, kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið boð um avgerðina.
§ 29, *stk. 2.* Kærunevndin í almanna- og heilsumálum kann síggja burtur frá kærufreistini, tá serlig viðurskifti gera seg galdandi.	§ 29, *stk. 2.* Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum kann síggja burtur frá kærufreistini, tá serlig viðurskifti gera seg galdandi.
§ 29, *stk. 3.* Avgerðir, tiknar av Kærunevndini í almanna- og heilsumálum, eru endaligar í fyrisitingarligum høpi.	§ 29, *stk. 3.* Avgerðir, tiknar av Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum eru endaligar í fyrisitingarligum høpi.